Jóannes Eidesgaard um Fiskavirking:

# – Gloyma kjarnina í málinum

**Formaður Javnaðarfloksins heldur, at samgongan skákar sær undan tí sentrala spurninginum í málinum viðvíkjandi einskiljingini av Fiskavirking. –Tað sentrala í málinum er, um føroyingar ella útlendingar skulu eiga fiskaídnaðin í Føroyum, sigur Jóannes Eidesgaard**

EINSKILJING
*Heri á Rógvi*



*Eidesgaard heldur, at samgongan roynir at skáka sær undan tí mest týdningarmikla í sambandi við einskiljingina av Fiskavirking*

Formaðurin í Javnaðarflokkinum, Jóannes Eidesgaard, dugir als ikki at síggja, hví tað hevur ein so stóran skund at einskilja Føroya Fiskavirking.

– Eg haldi, at tvídrátturin í samgonguni eigur at koma Fiskavirking til góðar. Tá mann ikki er førur fyri at semjast um leistin, so eigur hetta at koma Fiskavirking til góðar. Einskiljingin eigur heldur ikki at hava ein sovorðnan skund, sigur Jóannes Eidesgaard.

Hann leggur afturat, at hann hevur trupult við at síggja, hvussu samgongan skal kunna avgreiða hetta mál við teimum ósemjum og tvídráttum, sum støðugt stinga seg upp í hesum døgum.

Formaður Javnaðarfloksins heldur eisini, at tað vera ógvuliga torført hjá nevndini í Framtaksgrunninum at gera sítt arbeiði til lítar, tá politiski myndugleikin ikki megnar at melda klárt út, hvat hann vil.

## Gloyma kjarnina

Tað kom fram fyrr í vikuna, at nevndin fyri Framtaksgrunn Føroya nú fer undir fyrireikingarnar til at privatisera (einskilja) Føroya Fiskavirking. Tær næstu mánaðirnar verður eitt fyrireikingararbeiði gjørt til søluna av Fiskavirking. Selt verður undir einum, og keyparin er tann, ið bjóðar mest – uttan mun til heimstað.

Jóannes Eidesgaard er eisini fegin um, at Fiskavirking verður seld í einum, tá hon skal seljast. Hann heldur tað vera sera týdningarmikið, at Fiskavirking sleppur at virka sum ein eind.

Í Sosialinum í gjár kom tað fram, at samgongan ikki var samd um, hvørja leið at ganga viðvíkjandi søluni av Fiskavirking. Tjóðveldisflokkurin setir sum eina treyt, at Fiskavirking verður selt um ein føroyskan Virðisbrævamarknað, men hesum tekur Fólkaflokkurin ikki undir við.

Jóannes Eidesgaard heldur, at stóru samgonguflokkarnir gloyma tann mest týdningarmikla spurningin.

– Tað sentrala í málinum er, um um føroyingar ella útlendingar skulu eiga fiskaídnaðin í Føroyum. Hesum spurninginum hevur samgongan skáka sær undan, sigur Jóannes Eidesgaard.

Hann leggur dent á, at tað hevði verið ein vannlukka, um onkur útlendingur hevði ognað sær Fiskavirking.

–Ein virðisbrævamarknaður forðar ikki útlendingum at keypa Fiskavirking. Hvat nyttar tað at tosa um fullveldi, um føroyingar ikki eiga sína egnu vinnu, sigur Jóannes Eidesgaard.

Viðvíkjandi hesum spurninginum saknar Jóannes Eidesgaard eitt kjak á politiskum stiði.

– Skulu vit broyta tað soleiðis, at Fiskavirking ikki bert verður selt til hægstbjóðandi, so mugu viðtøkurnar fyri Framtaksgrunnin broytast, og hetta er ein politisk avgerð. Vit síggja fegnir, at kjakast verður um hetta í løgtinginum, sigur Jóannes Eidesgaard.

## Gongur væl

Formaður Javnaðarfloksins fegnast eisini um, at tað gongur so mikið hjá Fiskavirking, sum tað ger í løtuni.

– Tað spuruttar av motivatión, tá tú kemur inn á eitt flakavirki í Føroyum, og tað gongur væl hjá teimum, og hetta kastar nógvar pengar av sær, sigur Jóannes Eidesgaard.

Hann heldur seg eisini til sítt í spurningi um, hvør eigur at eiga og ikki.

– Tað snýr seg um at fáa tað at fungera, ikki hvør eigarin er, sigur Jóannes Eidesgaard, sum leggur afturat, at Fiskavirking virkar ógvuliga væl í løtuni.

Hann heldur samstundis einki um tosið, at politikkarar ikki skulu blanda seg í hesum avgerðini vera fullkomiliga burturvið.

– Alt hetta tosið um, at politikarar ikki skulu blandað seg er hyklarí, tí hetta eru spurningar, sum hava sera stóran fyri samfelagið og viðvíkja okkum, sigur Jóannes Eidesgaard.

## Gegni ein spurningur

Formaður Javnaðarfloksins heldur eisini, at gegni hjá serliga formanninum fyri Framtaksgrunnin kundi verið ein áhugaverdur spurningur at reist. Hann heldur, at spurningurin mestur er hóskandi fyri nýggja løgmálaráðið.

– Hann (Niels W. Poulsen, blðm.) er partur av einari fyritøku, sum umboðar fyritøkur, ið væl kunnu hugsast at vera millum keypararnar av Fiskavirking, sigur Jóannes Eidesgaard.

Niels W. Poulsen sigur við Sosialin, at tað ikki er nakar reellur trupulleiki, tí hetta er nakað, ið advokatar fáast við hvønn dag. Hann leggur kortini afturat, at hann ikki vil vera formaður fyri ein hvønn prís og vísir á, at formaðurin kann vera skiftur út, men prosessin eigur kortini at vera hildin.

Meinhard Jacobsen:

# Seljast undir einum

**– Konseptið hevur víst seg at rigga væl, og tað er ógvuliga týdningarmikið, at Fiskavirking verður selt undir einum, sigur Meinhard Jacobsen, stjóri fyri Fiskavirking**

EINSKILJING
*Heri á Rógvi*

Stjórin í Føroya Fiskavirking hevur einki ímóti, at Fiskavirking verður selt.

– Vit hava altíð gingið inn fyri, at vit skulu seljast, sigur Meinhard Jacobsen, stjóri fyri Føroya Fiskavirking.

Føroya Fiskavirking verður væntandi einaferð í heyst lýst til sølu, og nú eru fyrireikingarnar farnar í gongd.

Vit fáa ikki stjóran á Fiskavirking at siga nakað um, hvønn leist hann heldur vera rættast at selja Fiskavirking eftir, t.e. Virðisbrævamarknað ella annað. Hann sigur, at tað týdningarmikið, at felagið nú fær frið at virka.

Hann ivast tó ikki í, at tað er rættast at selja Fiskavirking undir einum.

– Konseptið hevur víst seg at rigga væl, og tað er ógvuliga týdningarmikið, at Fiskavirking verður selt undir einum, sigur Meinhard Jacobsen.

– Men hvat framtíðar eigarar fara at gera við Fiskavirking, tað kunnu vit ikki ávirka, sigur Meinhard Jacobsen.

Hann sigur, at gongdin higartil í ár hevur verið brúkilig hjá Føroya Fiskavirking.



*Meinhard Jacobsen, stjóri í Føroya Fiskavirking*



Búskaparráðið hartar Vinnumálaráðið:

# Føroya land rikið sum ein fyritøka

**Búskaparráðið finst hvassliga at vinnupolitikkinum hjá landsstýrinum, men Vinnumálaráðið fer ikki at svara ákærunum fyrr enn í næstu viku**

POLITIKKUR
*Páll Holm Johannesen*



*Búskaparráðið leggur Vinnumálaráðið undir at reka Føroya land sum eina fyritøku*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

Hann byggir á skeivar fortreytir.

Soleiðis ljóða greiðu boðini frá Búskaparráðnum um tann politikk, sum Vinnumálaráðið hevur sett út í kortið. Í niðurstøðuni í vinnulívspartinum av frágreiðingini hjá Búskaparráðnum verður dentur lagdur á, at vinnupolitikkurin byggir á grundleggjandi skeiva uppfatan av, at samfeløg, sum tað føroyska, eru í altjóða kapping, á sama hátt, sum fyritøkur eru tað.

Í niðurstøðuni verður soleiðis tikið til: - Samfeløg eru heilt aðrir skapningar enn fyritøkur, og búskaparligu samanhangirnir og spælireglurnar, sum galda fyri samfeløg, líkjast ikki teimum, sum galda fyri fyritøkur.

## Skeivur vinnupolitikkur

Búskaparráðið hevur tikið støði í teimum fimm ritunum, ið Vinnumálaráðið gav út fyri nøkrum árum síðani. Skeiva tilgongdin til vinnupolitikkin hevur við sær, at búskaparliga vælferðin hjá tí einstaka borgaranum í Føroyum er nógv verri enn hon kundi verið.

Høvuðsorsøkina, sigur Búskaparráðið vera, at skeiva tilgongdin ber við sær handilsforðingar av ymsum slag. Her verður hugsað um, at núverandi vinnupolitikkur í alt ov stóran mun leggur dent á søluvirðið av eini vøru. Eitt dømi er, at politikkararnir altíð rópa hart um, at fiskurin fyri alt í verðini má hagreiðast í Føroyum, áðrenn hann fer av landinum, so at søluvirðið verður so stórt sum gjørligt.

Hetta er ein skeiv fatan, tí tað er ikki søluvirðið, sum skal áseta, nær fiskurin skal av landinum, men virðisøkingin. Búskaparráðið vísir á dømi, at tá skip verða noydd at selja fiskin herheima, heldur enn fyri betri prís aðrastaðni, hevur henda forðing við sær, at samlaða virðisøkingin fyri tað føroyska samfelagið verður væl minni.

Dentur skal heldur leggjast á, hvat tað er brúkarin ynskir, og er hann ikki er sinnaður at lata so mikið av peningi fyri fiskin, so at hann verður seldur í Føroyum, so skulu skipini ikki vera noydd at selja hann her fyri minni prís, bara tí hægsti myndugleikin vil tað.

Hesar forðingar hava eisini við sær at samansetingin á arbeiðsmarknaðinum er ein heilt onnur, enn um frí kapping valdaði. Vit nýta arbeiðsmegi, í hesum førinum í fiskivinnuni, ið kundi verið betri gagnnýtt í aðrari vinnugrein. Men orsakað av handilsforðingum, verður samansetingin á arbeiðsmarknaðinum ikki tann, sum hon eigur, og hetta hevur við sær, at virðisøkingin minkar, sigur Búskaparráðið.

Høvuðsorsøkin til hesar skeivu tilgongdir til vinnupolitikkin, er tann, at føroyska samfelagið verður roknað sum ein fyritøka, og ikki sum eitt samlað samfelag, sum Føroyar í veruleikanum eru, stendur í niðurstøðuni frá Búskaparráðnum um vinnupolitikkin.

Hetta eru álvarsligar ákærur ímóti tí arbeiði, sum Vinnumálaráðið ger, og úr Vinnumálaráðnum siga tey, at ákærurnar fara ikki aftur við borðinum. Embætisfólkini og landsstýrismaðurin í vinnumálum, Bjarni Djurholm, fara nú at viðgera frágreiðingina frá Búskaparráðnum, og tey ætla at koma við eini viðmerking í næstu viku.

# Útlendsk arbeiðsmegi vælkomin

**Skulu vit hava føroysku arbeiðsmegina uttanlands heimaftur, sum mugu bústaðarviðurskiftini betrast munandi, sigur Búskaparráðið í seinastu frágreiðingini um føroyska búskapin**

ARBEIÐSPOLITIKKUR
*Páll Holm Johannesen*

Í frágreiðingini, sum bleiv almanna kunngjørd í gjár, nemur Búskaparráðið eisini við føroysku arbeiðsmegina. Her verður víst á, at føroyingar góðtaka ikki, at útlendsk arbeiðsmegi kemur hendanvegin. Forðingin fyri útlendskari arbeiðsmegi kemur allarhelst av, at vit vilja ikki hava útlendingar til Føroya, so leingi sum arbeiði ikki er allar føroyska hendur.

Her vísir Búskaparráðið á, at tað er ongin samanhangur millum hvussu stórt eitt arbeiðsloysið er, og hvussu nógvir útlendingar kunnu arbeiða her. Tað er bygnaðurin á sjálvum arbeiðsmarknaðinum, ið avger hvussu stórt eitt arbeiðsloysi. Roynst illa í einari vinnugrein, so er stórur vandi fyri, at fólk gerast arbeiðsleys innan júst ta vinnugreinina.

Nýta vit eitt nú byggivinnuna sum dømi, og henni roynst illa, so nyttar tað lítið at nýta uppsagdar handverkarar í einari vinnu, sum teir slettis ikki kunnu standa seg.

Um okkum til dømis vantar sjúkrasystrar, og hava ov nógvar handverkarar, so kunnu handverkarnir ikki bara uttan víðari skifta frá at vera handverkarar til sjúkrasystrar.

Tað er tí betri fyri føroyska samfelagið, um vit taka útlendingar inn í tær vinnur, sum vit ikki hava tøku arbeiðsmegina til, sigur Búskaparráðið í frágreiðing síni.

## Betri vælferðartænastur

Búskaparráðið vísir eisini á, at um vit skulu hava føroysku arbeiðsmegina uttanlands heimaaftur, so er neyðugt at betra um vælferðartænasturnar. Her verður serliga hugsað um bústaðarmøguleikarnar, barnaansing og eldrarøkt.

Skapa vit ikki betri umstøður á hesum økium, verða sera torført at lokka tann partin av føroyska arbeiðsmarknaðinum, ið starvast uttanlands, heimaftur

– Heldur núverandi støða fram við vantandi bústaðarmøguleikum, kann væl hugsast, at føroysku fyritøkurnar eru noyddar at venda sær tí útlendsku arbeiðsmegina, leggur Búskaparráðið aftrat í frágreiðingini.

Skal føroyski brúkarin fáa sum mest burturúr, so hevur tað stóran týdning, at føroyska fyritøkur fáa møguleikan at fáa útlendska arbeiðsmegi til Føroya, sigur búskaparráðið at enda í síni frágreiðing um føroyska arbeiðsmarknaðin